**Magnus Heinason – Túrfrágreiðing**
**Yvirlitstroling á Føroyabanka. Túrur nr. 1810**
**Tíðarskeið: 21/03-28/03-2018**

---

**Fólk við frá Havstovuni:** Marit Pedersen, Poul Vestergaard, Mourits Mohr Joensen, Ian Salter og Petur Steingrund.

**Ábyrgd:** Petur Steingrund (kanningarleiðari).

**Endamál:** Hetta var triði túrurin av yvirlitstrolingum á vári í ár. Høvuðsendamálið við túrinum var at fáa til vega tilfar, ið skal nýtast í stovnsmetingum av toski, hýsu og upsa, t.e. veiða í vekt og í tali, longdarbýti, vektbýti, aldursbýti, kynsbýti og kynsbúning av nevndum sløgum. Umframt skuldi vekt, tal og longdarbýti skrásetast fyri øll fiskasløg, ið vórðu veidd. Eisini skuldu magakanningar gerast av toski, hýsu, upsa, longu og brosmu.

**Aðrar uppgávur:** Nakað av toski, hýsu og øðrum varð selt til matstovuvinnuna og ferðavinnuna í Havn. DNA-prøvar vórðu tiknir av agnhøgguslokki. Sjógvprøvar vórðu tiknir á Føroyabanka til e-DNA kanningar. Lakssild varð tikin til fuglakanningar.

**Reiðskapur:** 116 fóts kassatrol við 40 mm meskum í posanum. Steinham lemmar. Breitlar 60 m og 120. Seabird CTD við rosettu. Miniloggarar at skráseta sjóvarhita.

**Um túrin:** Vit fóru av Havnini mikukvøldið kl 21. Vit byrjaðu at taka støðir hósmorgunin og tóku støðir á tí grunna fyrstu tveir dagarnar, síðan tær djúpu støðirnar vestanfyri. Sunnudagin tóku vit grunnar støðir og endaðu mánadagin við at taka djúpar støðir í eystara kanti á Føroyabanka. Vit náddu at taka allar 29 støðirnar umframt 18 CTD støðir, harav 9 glúpstøðir. Miniloggararnir vórðu kalibreraðir í Bankarennuni. Veðrið var sera gott allan túrin. Vit vóru á Havnini týsmorgunin kl. 7 og landaðu fyrrapartin.

**Prøvatøka:** Veiðan varð viðgjørd sambært kanningarætlanini og sýnishondbókini. Yvirlit yvir veiðu og nytrur (Talva 1) er víst niðanfyri. Talið av nytrum var eftir ætlan fyri hýsu, men ikki fyri tosk, tí nøgdin av toski var ov lítil.

**Nær eru prøvarnir upparbeiddir:** Túrurin var liðugt rættaður 26. mars. Ynskiligt er, at nytrurnar skulu vera lisnar og innlagdar í databasu í seinasta lagi 1. juni.

**Fyribilsúrslit:** Toskurin á Føroyabanka er framvegis ikki komin fyri seg aftur, við tað at nøgdin av toski í vekt lá á sama lága støði, sum hevur verið vanligt síðan 2006 (Talva 1, Mynd 1). Nakað av smáfiski var ímillum og veiðan í tali (130 toskar) var áleið tann sama sum í fjør (118 toskar). Eins og í fjør var sera nógv at fáa av hýsu (Mynd 2) og har var nógv smáhýsa ímillum. Nøgdin av upsa, mathøgguslokki og havtasku hevur verið ójøvn ár um annað uttan nakra øking ella minking (Mynd 3, 4, 5). Eingin kalvi er fingin síðan 2014 (Mynd 6). Magakanningar vístu, at tað var nógv til av nebbasild.

**Talva 1:** Veiða, nytrur og magar tikin á túri 1810, yvirlitstroling á Føroyabanka í mars 2018. Í 2017 vóru nærum ongar djúpar støðir tiknar og tí lítið veitt av m.a. havmús, gulllaksi, silvurmurti, longu, brosmu, kongafiski og gulllaksi.

| FISKASLAG | KG<br>í 29 hálum | Nytrur | Magar | KG<br>í 19 hálum í fjør | Lutfall KG per hál |
|---|---|---|---|---|---|
| HÝSA | 16380.859 | 400 | 120 | 8700.066 | 1.23 |
| HAVMÚS | 1744.339 | | | | |
| GULLAKSUR | 1492.520 | | | 1.225 | 798.25 |
| TOSKUR | 1038.915 | 130 | 52 | 1724.125 | 0.39 |
| SILVURMURTUR | 323.309 | | | | |
| UPSI | 292.540 | 91 | 29 | 302.93 | 0.63 |
| LONGA | 290.540 | 52 | 2 | 116.52 | 1.63 |
| SVARTKJAFTUR | 277.512 | 10 | 3 | | |
| MATHØGGUSLOKKUR | 232.811 | | | 298.195 | 0.51 |
| GLÝSUFISKUR | 206.674 | | | 460.894 | 0.29 |
| KJAFTSVARTI KONGAFISKUR | 121.222 | | | 1.255 | 63.28 |
| LÍTLI KONGAFISKUR | 82.027 | | | 31.505 | 1.71 |
| SKØTA (BATIS) | 41.010 | | | | |
| HAVTASKA | 40.175 | 11 | 10 | 54.57 | 0.48 |
| HVÍTINGSBRÓÐIR | 40.150 | | | 1.391 | 18.91 |
| HVÍTINGUR | 38.935 | | | 67.178 | 0.38 |
| KNURRHANI | 29.983 | | | 52.225 | 0.38 |
| HVALSPÝGGJ | 21.434 | | | | |
| SVARTBLETTUTA LANGASPORL | 15.891 | | | | |
| STÓRI KONGAFISKUR | 14.560 | | | | |
| SKRAMBUL | 13.743 | | | | |
| NEBBASKØTA | 8.150 | | | | |
| BROSMA | 7.860 | 2 | | 2.28 | 2.26 |
| TUNGA | 5.888 | | | 4.542 | 0.85 |
| BLETTUTA SKØTA | 5.370 | | | | |
| SANDSPRØKA (LL) | 5.267 | | | 25.937 | 0.13 |
| BLÁLONGA | 5.115 | 12 | 5 | | |
| GLASKVOYSA | 3.557 | | | 30.896 | 0.08 |
| GAMAL FISKUR | 3.238 | | | | |
| AGNHØGGUSLOKKUR | 3.206 | | | | |
| ECHINIDAE (IGULKER) | 1.817 | | | 3.383 | 0.35 |
| LÍTLABROSMA | 1.540 | | | | |
| NEBBASILD | 1.052 | | | 1.181 | 0.58 |
| REYÐI KNURRHANI | 0.515 | | | 9.512 | 0.04 |
| TRØLLAKRABBI | 0.234 | | | | |
| TILSAMANS | 22791.958 | 708 | 221 | | |




Mynd 1. Nøgd av toski per hál á Føroyabanka í mars.




Mynd 2. Nøgd av hýsu per hál á Føroyabanka í mars.




Mynd 3. Nøgd av upsa per hál á Føroyabanka í mars.




Mynd 4. Nøgd av mathøgguslokki per hál á Føroyabanka í mars.




Mynd 5. Nøgd av havtasku per hál á Føroyabanka í mars.




Mynd 6. Nøgd av kalva per hál á Føroyabanka í mars.

Havstovan, 26/3-2018

<u>Petur Steingrund</u>